Tórshavn – Juli 2024

# VÆLKOMIN Á SØGU- OG SAMFELAGSDEILDINA (SSD) Á FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Góði lesandi.

Vit vilja fegin ynskja tær hjartaliga vælkomnum á Søgu- og samfelagsdeildina. Vit vóna, at tú fert at trívast og at verða ein virkin luttakari í virkseminum, sum fer fram í Jónas Broncksgøtu 25. Vit fara at gera okkara ítasta fyri at fáa teg at kenna teg væl á deildini.

Vit senda tær herviđ stutta kunning í sambandi við lestrarbyrjanina.

Lestrarárið byrjar mánadagin 19. august kl. 9.00 í Kongshøll í Sjóvinnuhúsinum. Har verður felags innleiðsla fyri øll nýggj lesandi á Fróðskaparsetrinum. Klokkan 11.15 heldur innleiðslan fram á Søgu- og samfelagsdeildini. Vika 34 er innleiðsluvika, tvs. at vanliga undirvísingin byrjar í viku 35, mánadagin 26. august.

Tað er av stórum týdningi, at tú ert við til innleiðsluna, soleiðis at tú fært upplýsingarnar, tær tørvar – um skeið og útbúgvingar, mannagongdir og reglugerðir, kunningar- og samskiftispallar, starvsfólk og lestrarvegleiðing, osfr. Harafturat er innleiðslan eitt gott høvi at heilsa uppá tey fólk, sum tú fert at lesa saman við tey komandi árini. Tú fært eisini møguleikan at tosa við starvsfólk, sum kunnu royna at svara tínum spurningum um lestrarviðurskifti.

Kunning um pensumbøkur, sum tit skulu útvega tykkum innan lestrarbyrjan, síggja tit í hjálagda bókmentalista.

Um tú hevur spurningar ella viðmerkingar til okkum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við skrivstovuna á Fróðskaparsetrinum á lss@setur.fo ella útbúgvingarleiðaran, Andras Mortensen, á andrasm@setur.fo og tlf. 29 25 86.

Vit gleða okkum til at síggja teg.

Vinaliga

Erika A Hayfield
Dekanur, Søgu- og samfelagsdeildin

Andras Mortensen
Útbúgvingarleiðari í søgu

## Bókmentalisti

Bøkurnar eru bílagdar í Rit og Rák

Bøkur, sum tit skulu útvega tykkum innan undirvísingin byrjar, eru hesar:

### Eldri Heimssøga:

Palmer, A History of Europe in the Modern World, 2020 12e, Student Edition (A/P EUROPEAN HISTORY) 11th Edition by R. R. Palmer, Joel Colton, Lloyd Kramer Professor. Ch. 1 - 7 (s. 1 - 315). (Bókin kostar **739 kr.** Við í prísinum er atgongd til *smart-bók* á netinum *við lærihentleikum*. **Gevið gætur**, at ein seðil við kotu til smartbókina liggur inni í bókini. (Bókin verður eisini nýtt í fakinum Nýtíðar heimssøga).

### Sosiologi:

Macionis, J.J. & Plummer, K. 2012. Sociologi – A Global Introduction (5.útg.) Harlow: Pearson.

### Vísindaástøði og háttalag

Jacobsen, Michael Hviid, Lippert-Rasmussen, Kasper, and Nedergaard, Peter (2015), Videnskabsteori (3. útg.), Hans Reitzels Forlag.

# Skrá fyri innleiðsluna á Søgu- og samfelagsdeildini 2024

**Mánadagin 19. august í Kongshøll í Sjóvinnuhúsunum, Vestarabryggja 15**

Tiltakið byrjar kl. 09.15, men tit skulu helst møta eitt sindur fyrr at heinta tykkara lestrarkort uttan fyri Kongshøll.

Kl. 09.00 Skráseting

Kl. 09.15 Rektarin bjóðar vælkomin

Kl. 09.25 Lestrarskrivstovan bjóðar vælkomin

Kl. 09.30 Tónleikur

Kl. 09.45 Stutt røða

Kl 10.00 Lesandi fáa høvi at vitja básar. (Studni, Betri Banki, Landsbókasavnið, Rit og Rák, Ráð Teirra Lesandi, MFS og onnur verða boðin við)

*Lesandi fara út á deildirnar.*

**Kl. 11.00 Lesandi fara til SSD í Jónas Broncksgøtu 25, mentorar verða til hjálpar at vísa veg**

Kl. 11.15 Dekanurin bjóðar stutt vælkomin og felags myndatøka.

Kl. 12.00 Lesandi fara hvør við sínum útbúgvingarleiðara inn í undirvísingarhølini og bjóða vit eina lætta máltíð. Her fáa lesandi høvi til at heilsa uppá hvønn annan, útbúgvingarleiðaran og onnur, ið hava eitt serligt tilknýti til útbúgvingina. Útbúgvingarleiðarin kunnar um útbúgvingina, umframt krøv og væntanir til tann lesandi. Hetta er eisini ein góð løta at tosa saman og spyrja um møgulig ivamál.

Eisini verður rundsýning í bygninginum og høvi at heilsa uppá starvsfólk.

**Týsdagin 20. august**

Kunnandi tiltak við ymiskum viðkomandi fyrilestrum verður í Kongshøll í Sjóvinnuhúsinum (Vestarabryggja 15) millum kl. 9-11. Endalig skrá kemur seinni.

**Mikudagin 21. august**

Dagur saman við mentorum. Útferð til Nólsoyar. Møtast á Bursatanga kl. 9.15
Báturin siglir úr Havnini kl. 9.30, og vit sigla úr Nólsoy aftur kl. 13.00

Havið matpakka við.

**Fríggjadagin 23. august**

| | |
|---|---|
| Kl. 10.00 -12.00 | KT-vegleiðing í auluni á Námsvísindadeildini (Frælsið 20) – Skipað verður fyri víðkaðari KT-kunning fyrrapartin av degnum, har tey lesandi fáa høvi at sita við telduni og fáa beinleiðis vegleiðing at rita inn í ymisku skipanirnar, sum verða brúktar í útbúgvingini. |
| Kl. 17.00-20.00 | Felags døgurði í Jónas Broncksgøtu, har vit hugna okkum saman, áðrenn farið verður til SetursSamanShow. |
| Kl. 20.00 | SeturSamanShow í Reinsarínum |